# Fíggjar- og umsitingar-leiðari í SvF

Starvið sum Fíggjar- og umsitingarleiðari í Sjónvarpi Føroya er leyst at søkja.

Fíggjar- og umsitingarleiðarin er settur beint undir og við tilvísing til sjónvarpsstjóran. Bygnaðurin á stovninum er flatur við eini stjórn við stápseindum, eini fíggjar- og fyrisitingardeild, eini framleiðslu- og tøknideild umframt programmdeildum.

Bygnaðurin í Sjónvarpi Føroya er seinastu árini munandi umskipaður; hetta er ein framhaldandi tilgongd, og fíggjarstýringin og mannagongdir annars verða støðugt tillagaðar bygnaðin. Komandi fíggjar- og umsitingarleiðarin má ganga undir treytirnar, at bygnaðurin framhaldandi kann verða broyttur.

**Starvið:**
Fíggjar- og umsitingarleiðarin hevur við ábyrgd mótvegis stjóranum dag-liga raksturin av stovninum um hendi, hvat viðvíkur fyrisiting og fíggjarstýring. Starvið fevnir soleiðis um:

- dagligt roknskapareftirlit
- starvsfólkaviðurskifti
- fyrisitingarligar mannagongdir
- dagligt keyp

Høvuðsuppgávur hjá fíggjar- og umsitingarleiðaranum eru at leiða og skipa fyri tí dagliga arbeiðinum á fíggjar- og fyrisitingardeildini og at leggja til rættis ársfíggjarætlanir og langtíðar fíggjarætlanir innan teir karmar, sum stovnurin hevur at virka undir. Ein týðandi leiklutur hjá fíggjar- og umsitingarleiðaranum er at virka sum samstarvspartur bæði hjá stjóranum og hinum deildarstjórunum í øllum fíggjarligum og fyrisitingarligum málum.

Sum er, er fíggjar- og umsitingarleiðarin virkandi stjóri, tá sjónvarpsstjórin er burturstaddur ella hevur forfall.

Arbeiðsuppgávurnar fevna um:
- dagligu roknskaparførsluna og at gera deildarroknskapir
- at seta upp roknskapir fyri tíðarskeið og ársroknskapir
- at hava um hendi rakstrar- og gjaldførisætlanir
- at skipa fyri mannagongdum á øllum fyrisitingarligum økjum
- leiðsluna av móttøkuni og skrivstovuni
- ábyrgd av ognunum, sum stovnurin húsast í

**Umsøkjarin:**
Starvið er avbjóðandi og spennandi, og hevur tú hug at royna teg krevst, at tú hevur lokið búskaparligt embætisprógv ella hevur aðra samsvarandi útbúgving. Viðkomandi royndir innan fíggjarstýring, fyrisiting og leiðslu hava eisini áhuga.

Tað er avgerandi, at tú sum umsøkjari ert opin, hevur ein liðiligan hugburð og hevur góð samstarvsevni. Í starvinum krevjast evni at arbeiða sjálvstøðugt og at taka avgerðir og at duga at kommunikera hesar á ein hátt, sum elvir til loysnir og framburð.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsóknir við CV, viðmælum, prógvum og øðrum viðkomandi skjølum skulu verða Sjónvarpi Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi tann 1. oktober 2002.
Ætlanin er at seta starvið 1. november 2002 ella skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra ella Finn Lómstein, fíggjar- og umsitingarleiðara, telefon 340400.

Tórshavn, 10. september 2002

Sjónvarp Føroya
M.A.Winthersgøta 2
Postboks 21
110 Tórshavn

svf
Sjónvarp Føroya

*Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi umframt handilsligum virksemi.*

team85

# Sakarina

## í Ítróttarhøllini á Skála
## leygarkvøldið 5. oktober



Tiltakið byrjar kl. 19.00 við stórum køldum borði og undirhaldi, sum Robert McBirnie skipar fyri. Borðhaldið endar um. kl. 23.00

Kl. 23.30 fer Sakarina á pallin og teir spæla til hl. 03.30

**Atgongumerki til dansin: kr. 190,-**
**Atgongumerki til borðhaldið: kr. 175,-**
seinasta freist at keypa atgongumerki til borðhalrið er 29. sept.

**Bussamband**
Bussar fara úr Havn og Vestmanna kl. 17.30 og 22.30. Tekning á tel. 216464/216465 og 424254/217752.
Bussar fara av Toftum og Fuglafirði kl. 18 og 23. Tekning á tel. 448456/225356 og 441305/228451.

**Atgongumerki kunnu keypast:**
í Joma á Skála, í Stranda Sentrum á Strondum
í Kunningarstovuni í Havn og á Statoilstøðunum
í Runavík, í Klaksvík og á Tvøroyri

**Skála Ítróttarfelag**

Broytingar

# Skálafjarðarleiðin

**Frá mánadegnum tann 23. sep. siglir Ternan I eftir niðanfyristandandi ferðaætlan.**

**Siglir einans gerandisdagar**

| av Strondum | av Toftum | á Tórshavn |
|---|---|---|
| kl. 06:50 | kl. 07:00 | kl. 07:40 |
| kl. 13:40 | kl. 13:50 | kl. 14:30 |
| kl. 15:20 | kl. 15:30 | kl. 16:10 |

| av Tórshavn | av Toftum | á Strondum |
|---|---|---|
| kl. 08:10 | kl. 08:50 | kl. 09:00 |
| kl. 14:30 | kl. 15:10 | kl. 15:20 |
| kl. 16:20 | kl. 17:00 | kl. 17:10 |

Upplýsingar um ferðaætlanina fáast á rutuupplýsingini tlf. 34 30 30
Víst verður eisini til heimasíðu okkara á www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo



**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin

# Sjúkrasystir til Onkologiska ambulatorium!

Á Onkologiska ambulatoriinum er eitt avloysarastarv leyst at søkja vegna barnsburð, til setan 1. november 2002 ella eftir avtalu, til og við 31. mai 2003.

Talan er um setanarbrøk 0,5 við arbeiði í dagtíð gerandisdagar.

**Arbeiðsøki fevnir í høvuðsheitum um at:**
- kunna og vegleiða sjúklingar og avvarðandi um krabbamein
- tryggja eina kvalifiseraða viðgerð og eftirkanning av sjúklingum
- samskipað samstarv við aðrar deildir, primær øki og Ríkissjúkrahúsið
- kunna og vegleiða aðrar deildir um røkt og viðgerð av krabbameinssjúklingum
- samskipa viðgerð og eftirkanning hjá krabbameinssjúklingum
- sjálvstøðugar viðtalur
- ráðgeva um linnandi sjúkrarøkt

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrasystir
- faklig vitan og royndir við at røkta krabbameinssjúklingar
- faklig vitan og royndir við at viðgera krabbameinssjúklingar
- hug til tvørfakligt samstarv
- góð samstarvsevni
- arbeiða sjálvstøðugt

**Fyrimun hava umsøkjarar sum hava:**
- onkologiska eftirútbúgving

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya. Setanarøki verður Heiliráðdepilin við tilvísing til yvirsjúkrasystrina.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja tlf 313540 til Ásu Poulsen, yvirsjúkrasystir, lokal 300, e-post asap@ahs.fo

**Umsóknarfreistin** er 7. oktober 2002 kl. 12.00.

Skivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

# Undirvísingartilboð veturin 2002/03

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánakvøld | kl. 19.00-22.00 | **Máling og list** v/ Sámal Toftenæs | tlf. 443100 |
| Mánakvøld | tíð eftir avtalu | **Føroyskt fyri útlendingar** v/ Lív McLeod | tlf. 444382 |
| Týskvøld | kl. 19.00-22.00 | **Modelsmíð** (frítíðarvirksemi) v/ Ólavur Sjúrðarberg | tlf. 443192 |
| Týskvøld | tíð eftir avtalu | **Guittarspæl** v/ Søren Søgaard | tlf. 443402 |
| Týskvøld | kl. 19.00-22.00 | **Binding** v/ Aimy Toftenæs | tlf. 443100 |
| Týskvøld | kl. 19.00-22.00 | **Ættargransking** v/ Kristian M. Eliassen | tlf. 443252 |
| Mikukvøld | kl. 19.00-22.30 | **Teld á grundstig** v/ Jákup M. Sólbjørg | tlf. 443273 |
| Mikudag | tíð eftir avtalu | **Kór/gentukór** v/ Dánjal Eysturstein | tlf. 443204 |

Tilmelding hjá lærara í seinasta lagi 9. oktober. Undirvísingin byrjar í viku 44 treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning frá myndugleikunum.

Luttøkugjaldið er 300 kr.

**Leirvíkar Kvøldskúli tlf. 443234**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 150, Sp/f Haraldsen, 530 Fuglafjørður.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Daniel Magnussen, 340 Kvívík.
**Innkomin í nevndina:** Annika Magnussen, Heiðaskákið 10, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 19. september 2002*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 2894, P/F Atlantic Supply Base, 100 Tórshavn.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Simon Johan Kári Johannesen, 530 Fuglafjørður.
**Innkomin í nevndina:** Ólavur Asafson Olsen, Niðaravegur 18, 530 Fuglafjørður.

*Skráseting Føroya tann 19. september 2002*

*Kristin Balle*

zarepta

## Zarepta-legurnar 2002

Um GUD vil, er ætlanin aftur í ár at hava eina heystlegu í Zarepta á Vatnsoyrum frá fríggjadegi 11. oktober til mikudagin 16. oktober.

Legan er fyri 14-17 ára gomul og kostar kr. 450,00 fyri hvønn, íroknað ferðakostnað báðar vegir.

Tekning av leguluttarkarum fer fram á tlf. 28 61 40

Tekning av starvsfólki fer fram á tlf. 32 03 90

**Verið vælkomin til zarepta**

Sosialurin
Sosialurin
i

Nýggjur klæðnahandil í Havn søkir eftir

## Avgreiðslufólki

at arbeiða 1/2 tíð.

Vit ynskja at umsøkjarin
- er yvir 18 ár
- er ein góður seljari
- er íðin og ágrýtin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er dugnalig/ur í samstarvi við viðskiftafólk

Umsóknir sendast til Diva v/Anju Olsen, Bókbindaragøta 2, FO-100 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. sept

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja á Tel 226632

Diva
**Dr. Jacobsens gøta 3, Tel 322680**




GEVIÐ BLÓÐ